# BØNARLØTAN

JUNI - JULI - AUGUST 2026 41. árg.

***1. dagur Jer. 46.11-28, Luk. 11.33-54, Luk. 17.1-21***




*Lív handar einum leiðara fyrstu týðing av 1. Mós.*

## SENEGAL, Tongia
## Lív Poulsen

Vit hava lisið ígjøgnum alt NT. Bíbliutímarnir ganga væl, og ungi umsetarin leiðir løturnar. Hann hevur tikið ábyrgd og veksur andaliga. Hann skal hava skurðviðgerð í eygunum í juni. Bankaflytingin hjá mær úr Føroyum kom nú fram eftir fimm mánaðir. Sera nógv arbeiði hevur verið seinastu mánaðirnar, men Harrin hevur signað, so alt hevur borið til. Í juni skulu 1. og 2. Kongabók prentast, og eg skal hava nýtt samleikakort í Dakar. Eg komi heim til Føroya síðst í juni, veit ikki enn hvussu leingi. Biðið fyri øllum hesum viðurskiftum.

**KRINGVARPIÐ**
7. juni .................... Útvarpsmøti, Bethel, Vágur

**EVANGELISKA RØDDIN – Aldan (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv. kl. 21 .... Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv. kl. 21 ........ Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. dagur — Luk. 6.1-26, 2. Sám. 4.1-12, Luk. 17.22-37*

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Lydia 16**
Í juni venji eg (Claire) trúboðarar, ið fara í stutt- og langtíðartænastu. Nógv eru tilmeldað, so okkum tørvar helst størri høli næsta ár. Í juli hjálpi eg at fyriskipa skeið í Rumenia. Eg skal eisini bæði vitja í Føroyum og vera hjálparfólk á TeenStreet UK. Biðið fyri ungdóminum, at tey vaksa andaliga, og at Harrin fyrireikar tey at tæna Sær.

## *3. dagur — Luk. 6.27-49, 2. Sám. 5.1-25, 2. Sám. 20.1-26*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**



Vit fara úr Manila til Toronto, USA, 1. juni. Liz hevur verið illa gongd og fær illa sovið fyri pínu. Kankanaey-fólkið hevur heilsað okkum hjartaliga og takkað fyri, at vit bóru teimum evangeliið, og at tey nú kunnu bera tað víðari. Jesus segði: *Eg skal byggja samkomu Mína*, og tað ger Hann!

**ZAREPTA**
Biðið fyri familju- og summarlegunum. Minnist Sámal Mikkelsen og øll starvs- og hjálparfólk.

## *4. dagur* *Jer. 47.1-7, 2. Sám. 6.1-23, 2. Sám. 21.1-22*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Enn hava vit ikki kunnað lossað byggitilfarið, men nú eru ísviðurskiftini batnað. Biðið fyri arbeiðsliðnum, ið kemur 4. juni, og fyri innbjóðing og fyrireikingunum til legurnar, og at Harrin opnar hjørtu fyri evangeliinum á legunum í summar. Vit vóna, um ísviðurskifti loyva, at bjóða børnum í øllum bygdum suður á Kappan.

## *5. dagur* *Jer. 48.1-24, Luk. 12.1-15, Luk. 18.1-17*



**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 17**

Vit verða í Føroyum til 8. juli. Biðið, at Harrin styrkir tey, ið eru eftir í Dakar. Foreldrini hjá Marion hava ikki verið frísk. Vit gleða okkum at vitja samkomuna í Antioch, Illinois. Tey hava stuðlað okkum øll árini, vit hava verið í Afrika. Vit verða aftur í Dakar 10. aug. Ryan byrjar aftur á Dakar Academy 12. aug. Hetta er hansara síðsta skúlaár í Senegal.

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

* 5. august fyllir Karis Flanagan 13 ár

## *6. dagur* *Jer. 48.25-47, Luk. 12.16-40, Luk. 18.18-43*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 14, Noah Kristian 11**

Fyrstu tríggjar vikurnar í juni vitja vit í Føroyum, og seinni eisini í Onglandi og Niðurlondum. Biðið um góða heilsu, varðveitslu og styrki á ferðini.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein**

## *7. dagur* *Luk. 7.1-23, Luk. 12. 41-59, 2. Sám. 22.1-25*

**DANMARK, Frikirken Bindslev, Jútland**

7. juni, 12. juli og 9. aug. hava vit *åben kirke*, sum danir siga. Vit ganga hús úr húsi at bjóða fólki at koma við. Biðið, at Harrin signar, og at danir hoyra gleðiboðskapin.



**DANMARK, Glostrup Frikirke**

Vit hava breyðbróting sunnumorgun kl. 11 og familjumøti kl. 12 alt summarið.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## *8. dagur* *Luk. 7.24-50, 2. Sám. 7.1-29, 2. Sám. 22, 26-51*



**OM, SUÐURAFRIKA,**
**OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**

Vit koma heim til Føroya at vera í eitt ár. Eg misti enn eina ferð fostur og varð innløgd á bráðdeild, men Gud hevur hjálpt okkum væl. Okkum tørvar hvíld fyri at koma fyri okkum. Kurt søkir *Fast Track* arbeiðsloyvi. Vit fara at hjálpa eitt sindur til í OM Føroyar. Vit søkja íbúð og bil. Biðið saman við okkum.

## *9. dagur* *Jer. 49.1-19, 2. Sám. 8.1-18, Luk. 19.1-27*



**MEKSIKO,**
**Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Jónatan 16, Markus 14,**
**Evita 11, Joy 9**

Í juni vitja vit ymsastaðni í USA, eitt nú samkomur í Oregon. Vónandi heldur bilurin. Beinið hjá Rosi er batnað, og hon fær sitið í stóli í løtum. Í juli eru ungdómslegurnar á Campamento Berea. Í aug. hava vit barnatiltøk her í Puruándiro, áðrenn skúlin byrjar.

9. juli fyllir Elliot Poulsen 10 ár

## *10. dagur* *Jer. 49.20-39, 2. Sám. 9.1-13, Luk. 19.28-48*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Hóast skráin summarmánaðirnar ikki er sum vanligt, er møti hvønn sunnud. 22.-26. juni er VSB *Vacation Bible School*, sum er bíbliuskúli/lega fyri børn. Til hetta og onnur tiltøk gjøgnum summarið tørvar okkum nógv hjálparfólk.



**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Biðið, at Gud signar verkið við Ástjørn, at børn og ung hava opið hjarta fyri Guds orði. Summarlegurnar hava í 80 ár boðað evangeliið. Hóast andaligt myrkur eru nógv børn signað. Flestu børnini eru ikki úr trúgvandi heimi.



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Tabita 12, Debora 10, Natan 7**

## *11. dagur* *Luk. 8.1-18, Luk. 13.1-17, 2. Sám. 23.1-39*



**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 5, Boas 4, Jóanes 0**

Vit flyta aftur til Føroya í summar eftir at hava verið í Kristnastovu í næstan tvey ár. Vit eru takksom fyri hesa tíðina. Fyrst í aug. flyta Súsanna og Guttorm Joensen inn og taka við ábyrgdini fram til ársskiftið. Biðið fyri verkinum í og út frá Kristnastovu, sum framvegis hevur stóran týdning fyri føroyingar í Keypmannahavn.

## Susan og Øssur Berghamar



Seinasta fríggjakvøldsmøti áðrenn summarfrítíðina verður 19. juni. Vit byrja aftur 21. aug. Møtini sunnumorgun kl. 11 halda fram alt summarið. Øll, sum ferðast hendavegin, eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Fleiri teirra, sum hava myndað samkomuna seinastu árini, fara nú heim aftur. Biðið, at onnur taka við, og at vit kenna leiðslu Harrans í verkinum frameftir. berghamar@kristnastova.dk

***12. dagur Luk. 8.19-39, Luk. 13.18-35, 2. Sám. 24.1-25***

## Atlantic Mission



Biðið áhaldandi fyri okkum, sum vit boða gleðiboðskapin á gøtuni fyri bæði føroyingum og ferðandi. Vit verða uml. 20 fólk, ið evangelisera í Danmark 24. juli - 4. aug. Biðið um dirvi og orð, ið røkka teimum, ið hoyra.

## ONGLAND, Cornwall
## Anna Rodda

***13. dagur Luk. 8.40-56, 2. Sám. 10.1-19, Luk. 20.1-26***

## GRØNLAND
## Juvel II
## Gull-Britt og Karsten Hansen



Juvel II hevur byrjað ferðina í Grønlandi. Higartil hevur Harrin sanniliga hjálpt. Biðið um signing á ferðini frá

bygd til bygd og um frelsu og uppbygging. Nakað av manning vantar enn til ávís øki. Ringið til Karsten 285007.

## *14. dagur* *Jer. 50.1-24, 2. Sám. 11.1-27, Luk. 20.27-47*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffia**
**Hans Sivertsen**
Minnist legurnar. Immanuel hevur ongan skipara partar av summarinum, kunning +299 263509.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**
Ferð Daniels til Uganda gekk væl. Pastor Fred evangeliserar millum lokalfólk. Hann er vorðin eitraður fleiri ferðir, so tað er eitt undur, at hann livir enn.

## *15. dagur* *Jer. 50.25-46, 2. Sám. 12.1-31, 2. Kong. 1.1-18*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**
Møti verða alt summarið soleiðis: Sunnud. breyðbr. kl. 11 og ev. møti kl. 18. Bønar-/uppb.møti mikud. kl. 20. Kaffi og samfelag týsd., hósd. og leyg. kl. 14.30-16. Øll eru vælkomin.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



*15. juni fylla Micah og Reuben Magura 13 ár

***16. dagur Jer. 51.1-30, Luk. 14.1-15, 2. Kong. 2.1-25***



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Ev. tiltak verður í høllini á Drelnesi 13. juni. Svenning talar. Vit vitja familju í DK 25. juni - 6. juli. 27. juli verður sangløta í Ebenezer, Birgir Andreasen og Svenning skipa fyri.

**Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 14, Petra 11**
Í summar hava vit tjaldmøtir og sjónvarpsmøtir í Danmark, Noregi og Svøríki. Onkrar løtur verða eisini í Føroyum.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Birita og Petur á Roykheyggi**

*16. juni fyllir Emma Guttesen 10 ár

***17. dagur Jer. 51.31-64, Luk. 14.16-35, 2. Kong. 3.1-27***



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Vit endurskoða framvegis Matt., Mark. og Luk. fyri at tryggja samsvar millum grikska og mixtec tekstin. Biðið um gott internetsamband til hetta arbeiðið. Vit vóna at geva Kol. og Filemon út skjótt.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. dagur — Luk. 9.1-22, 2. Sám. 13.1-20, Luk. 21.1-19*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 14, Emma 10**

*Parola* verður 3.-10. aug. Biðið, at ungu luttakararnir úr Føroyum læra at kenna Gud og Orð Hansara betur. Eisini hava vit ymisk barnatiltøk gjøgnum summarið. Biðið, at alt skal gangast væl.

## *19. dagur — Luk. 9.23-42, 2. Sám. 13.21-39, Luk. 21.20-38*



**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**

Í fleiri ár hava 2-300 fólk um vikuna fingið NT og annan lesnað frá bíbliubrævaskeiðnum. Nú er talið vaksið til eini 1300. Uml. 25% av hesum halda fram við skeiðnum. Helvtin eru kvinnur, og tað er óvanligt í slíkum londum. Biðið, at Harrin sendir fleiri verkafólk at gera uppfylgingararbeiði. Nakrir túrar verða gjørdir til landspartar í Turkalandi, har bert fá trúgvandi eru. Biðið um varðveitslu, og at mong verða nádd.



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

## *20. dagur* *Luk. 9.43-62; 2. Sám. 14.1-33, 2. Kong. 4.1-21*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 9, Timon 7, Manuel 2, Salome 2**

Vit valdu 12 luttakarar til fyrsta flokkin í kovol lesikunnleika. Tað er lætt fyri summi og fyri onnur torført, men tey eru glað fyri at lesa Orð Guðs á egnum máli. Biðið, at tey halda á komandi 4 mðr. og fullføra. Biðið um vísdóm til at undirvísa og áhaldandi bíbliutýðing.

*20. august fyllir Boas Norðberg 4 ár

## *21. dagur* *Jer. 52.1-14, Luk. 15.1-19, 2. Kong. 4.22-44*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**

Tað gongur framá at planta nýggja samkomu í Orvault. Í sept. byrja 4 ymisk møtir. Fongsulstænastan gongur væl. Jordan, ein fangi, er farin at vísa Bíbliuni áhuga. Biðið, at vit verða endurnýggjað á kristnari legu í Alpunum.

## *22. dagur* *Jer. 52.15-34, Luk. 15.20-32, 2. Kong. 5.1-27*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 5, Selah Rose 3**

Vit hava notið tíðina saman við familju og samkomu her í USA. Biðið um trygd á vegunum, sum vit koyra langar teinar. Vit fyrireika ferð til Týsklands seint í aug., har vit skulu vitja Benjamin

og Winu, og síðani til Føroya at vera allan sept. Vit gleða okkum at síggja tykkum øll.



**Mission Aviation Fellowship,**
**MAF Føroyar**
**Martha og Andrias Hansen**

**ONGLAND,**
**European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

| *23. dagur* | *Luk. 10.1-22, 2. Sám. 15.1-16, Luk. 22.1-23* |
|---|---|



**FØROYAR**
**Anna og Símun Pætur**
**á Torkilsheyggi**

Takk, at tit biðja fyri okkum og arbeiðnum í samkomunum. Vit gleðast um alt arbeiðið, sum er gjørt í vetur í Zarepta við Agnari Josephsen og hansara toymi. Bíbliuskeiðið í heyst byrjar 24. aug. kl. 18 og endar 29. aug. Tekning frá 15. juli hjá Giddu Vang, 265390.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Cathy hevur trupulleikar við nýrunum.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 14**

*23. august fyllir Ethan Flanagan 9 ár

## *24. dagur Luk. 10.23-42, 2. Sám. 15.17-37, Luk. 22.24-46*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Noah 17, Karis 13, Judah 11, Ethan 9**

Patur fekk medisinska hjálp fyri sína húðsjúku, Nya er frísk eftir bruna í maganum, og Annika kundi flúgva inn á meginlandið at vera hjá henni. Noah skal til hjartakanning, kanska til lækna í Avstralia. Vit lesa 1. Tim. og Titus saman við mengen samkomuni og læra um hjúnaband og familju. Vit flyta inn á meginlandið at vera saman við børnum okkara teirra síðsta skúlaár. Soleiðis kunnu vit átaka okkum størri leiðsluábyrgd umframt at arbeiða víðari við mengen undirvísingarætlan og umseting.

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 10, Jude 7, Evelyn 6, Olivia 2**

* 24. august fyllir Louis Hansen 9 ár

## *25. dagur 2. Sám. 1.1-27, 2. Sám. 16.1-23, Luk. 22.47-71*



**PAPUA NÝGUINEA,**
**Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Skúlaárið er nú liðugt. Summir næmingar koma aftur í sept. at lesa víðari, aðrir leggja ætlanir um at fara uttanlands at tæna sum trúboðarar. Biðið fyri teimum. Nýggja skúlaárið byrjar í sept. Skúlin hevur tørv á sjálvbodnum til køkin og barnaansingina.

## *26. dagur* *2. Sám. 2.1-32, Luk. 16.1-13, 2. Kong. 6.1-23*

**MEKSIKO, Maravatio**
**Isabel og Edy Mora, Marianna**

Biðið, at fleiri av teimum, vit granska Bíbliuna saman við, vilja hava andaligt samfelag og koma til uppbyggingarmøtini í heimi okkara. Biðið um umvending og um, at trúgvandi styrkjast í trúnni. Vit vænta okkara annað barn í sept. Biðið, at vit finna ein góðan lækna her í Maravatio.

## *27. dagur* *2. Sám. 3.1-19, Luk. 16.14-31, 2. Kong. 7.1-20*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 13, Micah 13**

Vit biðja framhaldandi fyri hølum til sunnudagsskúlan, nú vit missa helvtina av leigaðu samkomuhølunum í juli. Vit eru Harranum takksom fyri trúfesti tykkara í bønini.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. dagur* *2. Sám. 3.20-39, 2. Sám. 17.1-29, 2. Kong. 8.1-29*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Biðið fyri møtum, samtalum, lærisveinaskapi og tænastuni á netinum. Enska STEVN verður upptikið og lagað til í løtuni og skal helst vera liðugt fyrst í juli. Biðið, at Harrin opnar dyrnar, hvussu vit best kunnu vera til signing fyri tey kristnu í Pakistan, serstakliga í hesum døgum, nú ágangurin er vaksandi.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**

## *29. dagur* *Luk. 11.1-13, 2. Sám. 18.1-33, Luk. 23.1-19*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar, Lydia 9**
Skúlaárið er nú farið, og eftir 13 ár í tænastuni hava vit sæð Guds hond virka millum okkum. Vit biðja um endurnýggjan og íblástur, til vit byrja aftur í aug. Vit vitja kanska í Føroyum. Takk fyri umsorgan og forbøn gjøgnum farna árið.

**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

*29. juli fyllir Timon Hansen 7 ár

## *30. dagur* *Luk. 11.14-32, 2. Sám. 19.1-23, Luk. 23.20-34*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 16, Nana 14, Louie 12, Rio 7**
Biðið fyri arbeiðnum í samkomuni, serliga ensku kafé okkara. Nøkur eru givin at koma, eftir at vit byrjaðu at lesa í bíbliuni og tosa meira um okkara trúgv. Tó er eitt par, sum vísir serligan áhuga. Biðið fyri teimum, og biðið um, at nøkur nýggj koma aftrat.


| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

**Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna**
Eydna Háberg átti hugskotið til hesa kendu røðina, har Jógvan Zachariassen og Símun Absalonsen samtala um allar bøkurnar í Bíbliuni. Hetta er eitt frálíkt høvi at velja at lurta eftir júst tí partinum, tú hevur hug til. Røðin kann eisini takast niður sum podcast á flestu podcastplattformum, t.d. Apple podcasts og Spotify.

https://lindin.fo/news/27/ein-forvitnislig-ferd-gjognum-bibliuna





**BÓKATÆNASTAN**
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ
Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo